# Illveður í USA

Um vikuskiftið var rættiligt illveður við nógvum vindi og nógvum regni í fleiri statum við amerikonsku eysturstrondina. Veðrið gjørdi serliga um seg í statunum Pennsylvania, New Jersey, New York, West Virginia og Connecticut. Nógvastaðni fór streymurin, og í gjár høvdu meiri ein millión fólk ongan streym. Vegasambandið er eisini illa farið nógvastaðni. Illveðrið hevði stóra ávirkan á samferðsluna, og fleiri flogfør, sum skuldu til New York, fingu boð um at fara til Boston ístaðin fyri.



# Slit í Kili

Eitt brek við einum umformara gjørdi, at meginparturin av Kili misti streymin beint fyri midnátt í gjárkvøldið. Samstundis fór ein stórur partur av telefonskipanini eisini. Innanríkisráðharrin, Rodrigo Hinzpeter, segði fyrrapartin, at 80 prosent av landinum fingu streymin aftur tíðliga í morgun, men at trupulleikar vóru framvegis við telefonini. Kilsku myndugleikarnir siga, at streym- og telefonslitið høvdu ikki samband við tann harða jarðskjálvtan fyri fjúrtan døgum síðani. Umleið 800 fólk doyðu av jarðskjálvtanum, sum var 8,8 á Richter-stiganum.




*Eysturskúlin heldur áfram við ætlanunum um Nám-X, men núu sum stakur skúli.*

# Eysturskúlin heldur sjálvur fram við Nám-X

**Hóast at ætlanin um at allir 10. flokkar í Havn skuldu byrja í Eysturskúlanum er steðgað, vil skúlin ikki svíkja næmingarnar, og heldur tí á fram við Nám-X sum stakur skúli.**

SKÚLI
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Ætlanin hevur verið, at allir 10. floksnæmingar í Tórshavnar kommunu skuldu savnast í Eysturskúlanum eftir summarfrítíðina.

Áhugin fyri „Nám-X", sum 10. flokkur verður kallaður, er stórur, og sambært Eyðdis Eidesgaard, skúlastjóra í Eysturskúlanum, eru yvir 180 umsøknir komnar inn til skúlan.

Hon heldur ikki, at skúlin kann bakka nú, og tí bjóðar Eysturskúlin nú Nám-X sum stakur skúli og ikki sum nakað samskipað átak í kommununi.

- Vit halda á fram við fyrireikingunum. Møguliga verða nakrar tillagingar gjørdar í samlaða undirvísingartilboðnum, sigur Eyðdis Eidesgaard.

## Ikki loyvt

Um kæruna frá Kommunuskúlanum skrivar Andrea Heindriksdóttir, forkvinna í skúlastýrinum fyri Tórshavnar Kommunuskúla soleiðis í einunm skrivið:

„Skúlastýrið í Tórshavnar Kommunuskúla hevur ongantíð viðmælt, at 10.flokkarnir í kommununi skulu savnast í ein depil í Eysturskúlanum, men hevur hinvegin staðiligа víst avvarðandi myndugleikum á skeivleikarnar við hesi mannagongd. Tórshavnar Kommuna hevur uttanum skúlastýrið tikið avgerð um at flyta allar næmingar í 10. flokki til Eysturskúlan, og hetta hevur kommunan ikki einvíst loyvi til sambært galdandi fólkaskúlalóg."

Hon endar skrivið við, at næmingar í 10. flokki eisini komandi skúlaár fara at fáa undirvísing í Tórshavnar Kommunuskúla.

## Kommunan ikki samd

Tórshavnar Kommuna er ikki samd við Kommunuskúlanum. Kæran verður viðgjørd í løtuni og, um tað verður eitt samlað 10. flokks tilboð í Eysturskúlanum kann kommunan ikki siga við vissu fyrr enn Fiskimálaráðið hevur sagt sítt um málið.

Orsøkin til, at málið er endað í Fiskimálaráðnum, er at bæði Mentamálaráðið og Innlendismálaráðið eru ógegnig.

Eyðdis Eidesgaard vónar, at ein avgerð fellur skjótt. Men meðan óvissan enn ræður, bjóða bæði Eysturskúlin og Kommunuskúlin undirvísing fyri 10. flokk komandi skúlaár.

### Eysturskúlin sigur:

Í skjótt 5 ár hevur verið arbeitt við at savna allar 10. flokkarnar í Tórshavnar Kommunu í Eysturskúlanum. Hetta hava tvey býráð samtykt, játtan er frá Mentamálaráðnum og hevur hetta eisini havt fulla undirtøku í øllum skúlastýrinum í kommununi. Ja, enntá var ígildissetanin útsett eitt ár, frá 2009 til í ár eftir ynski frá Kommunuskúlanum. Sostatt var eingin mótstøða móti ætlanini, fyrr enn hon nú skuldi realiserast.

### Kommunuskúlin sigur:

- Mentamálaráðið góðtók ikki umsókn frá Tórshavnar Býráði um at savna allar 10. flokkarnar í Tórshavnar Kommunu í sjálvstøðugan skúla og bygnað, við sjálvstøðugari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í 10. flokki. MMR vísti á aðra skipan. Men í staðin fyri at gera skúlastýrunum greitt, at upprunaliga uppskotið ikki bleiv góðkent, valdi Tórshavnar Býráð at arbeiða víðari við eini ætlan, sum býráðið ikki hevur heimild til at seta í verk.